Ferðast í egnum landi:

# Ferðaráð Føroya mennir føroysku ferðavinnuna

Ferðaráð Føroya er ein stovnur, sum hevur til uppgávu at menna føroyska ferðavinnu. Tað er ein almennur stovnur undir vinnumálaráðnum. Ferðaráð Føroya viðurkennir, at tað eru nógv viðurskifti hjá ferðavinnuni, sum ikki eru nøktandi, og tí verður arbeitt við nøkrum ávísum uppgávum. Nakrar av uppgávunum, arbeitt hevur verið við, eru: skelting, økisferðavinnuætlanir fyri allar Føroyar, altjóða verkætlanin Destination Viking, Sagas and Storytelling Søgur og frásøgn og náttúra og umhvørvi. Hetta eru fjøltáttaðar og í mongum førðum uppgávur, sum eru tengdar at arbeiðsorku og samstarvi við onnur liði ferðavinnuni.

Ferðaráð Føroya vísir útlendskum ferðafólkum á ferðamál, sum tey kunnu fara til. Tí ferðast Ferðaráð Føroya runt landið og kannar, hvat er vert at vísa ferðafólkum til.

























Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari